ítróttur

Nr. 35 • leygardagur • 19. februar 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# GÍ og Kaupthin á fimta ári

**Fimta árið á rað er Kaupthing høvuðsstuðul hjá GÍ**

SPONSORAVTALA
*Jákup Mørk*

Hósdagin skrivaðu GÍ og Kaupthing undir nýggjan stuðulssáttmála, sum á fimta árið ger íløgubankan til høvuðsstuðul hjá GÍ.

Brandur Jacobsen, sum er nýggjur formaður í GÍ, sigur, at teir sjálvandi eru fegnir um, at samstarvið enn einaferð kann halda fram, og sjálvur vónar hann, at hetta er nakað, sum er báðum pørtum at gagni.

– Sjálvur haldi eg, at talan hini árini hevur verið um eitt gott samstarv. Og tá avtalan verður longd, so gangi eg eisini út frá, at tey í Kaupthing halda tað sma.

– Hetta við at høvuðsstuðlar eru leingi hjá einum felag, er eisini rættiliga vanligt í føroyskum ítrótti, og fyri okkara viðkomandi kann eg siga, at tað skapar



*Aftur í ár verður tað Kaupthing, sum fer at prýða bringuna á gøtumonnum, tá teir fara at takast við ymsu fótbóltsfeløgini kring landið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

stabilitet. Og ikki minst gevur tað okkum betri orku, nú vit royna at fáa felagið upp aftur har, sum vit sjálvir halda okkum hoyra heima, staðfestir hann.

Brandur sigur annars, at teir nú halda seg vera til reiðar at taka kappingina upp í fótbóltsárinum, sum liggur fyri framman.

– Leikarahópurin er komin upp á pláss, so nú er tað bara sjálvt fótbóltsspælið, sum vit hugsa um. Sjálvandi vil tað altíð vera so, at vit hava antennurnar úti, um møguleiki fyri styrki brádliga íkemur, men her og nú er tað so ikki nøkur undirskrift, sum vit liggja eftir, sigur hann enda.

# Bogi og Jákup nógv bestir

**Hesa síðstu tíðina hevur nógv bridge verið á skránni hjá føroysku bridgeleikarum. Bæði Føroya Bjór Simultan og Steypakappingin eru leikt**

FØROYA BJÓR SIMULTAN
*tíðindaskriv*

Stóra árliga simultan kappingin hjá Føroya Bridge Samband hevur verið. Spælt varð kring landið á hesum støðum: Í Bridgehúsinum í Havn, Í Bridgehúsinum í Vági, Í Høllini á Kambsdali, í skúlanum í Miðvági og í Bridgehølinum í Klaksvík.

Aftur í ár var luttøkan farmúr góð. Áleið 120 spælarar luttóku í Føroya Bjór Simultan og er tað nakað meir enn í fjørð.

Spæld vóru somu spøl kring landið. Ein vinnari varð fyrst funnin fyri hvørt spælistað. Síðani vóru øll spælistøðini gjørd upp sum eitt ræð og ein samlaður vinnari varð síðani funnin.

**3 tey bestu pørini í Suðuroy:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 Dia Poulsen | Óli Holm | 130 |
| 2 Hanneba | Andreas | 111 |
| 3 Finn | Sámal Pauli | 111 |

**3 tey bestu pørini í Vágunum:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 Josta | Verna | 102 |
| 2 Finnbogi | Poul | 100 |
| 3 Jóhannes | Torleif | 98 |

**3 tey bestu pørini í Tórshavn:**
**Ræð 1**

| | | |
|---|---|---|
| 1 Bogi Simonsen | Jákup Hjaltalin | 152 |
| 2 Heðin Mouritsen | Jóannes Mouritsen | 115 |
| 3 Henri. Svenstrup | Jóna Grunnveit | 108 |

**Ræð 2**

| | | |
|---|---|---|
| 1 Kaj Alstrup | Høgni Hansen | 122 |
| 2 Reim. Langgaard | Marner Joensen | 116 |
| 3 Rói á R. Joensen | Arnbjørn Sivertsen | 115 |

**3 tey bestu pørini í Klaksvík:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 Páll Sigm. Sørensen | Jógvan Clementsen | 100 |
| 2 Álvur Klakk | Randi Jacobsen | 97 |
| 3 Debes Christiansen | Finn B. Dam | 95 |

**3 tey bestu pørini í Klaksvík:**
**N/S**

| | | |
|---|---|---|
| 1 Jógvan Ranghamar | Atli Hansen | 189 |
| 2 Dia Petersen | Haldor Ellingsgaard | 179 |
| 3 Símin Lassaberg | Dia Jacobsen | 178 |

**E/V**

| | | |
|---|---|---|
| 1 Edmund Joensen | Hans Egil Joensen | 190 |
| 2 Hjalmar Joensen | Leif Pedersen | 188 |
| 3 Rógvi Nielsen | Sólbjørn Klein | 182 |

Tá ið uppgerðin fyri alt landið var liðug, stóð tað greitt, at Bogi Simonsen og Jákup Hjaltalin høvdu vunnið við met høgum stigatalið. Miðaltalið fyri hvørt spælið hjá teimum var ikki minnið enn 75,8 %.

**10 tey bestu samlað:**

1 Bogi Simonsen Jákup HjaltalinTórshavn
1.064 75,8%
2 Dia Poulsen Óli Holm Suðuroy 901 64,2%
3 Josta Olsen Verna RasmussenVágum 883 62,9%
4 Reimund Langgaard Marner JoensenTórshavn
856 61,0%
5 Rói á R. Joensen Arnbjørn SivertsenTórshavn
847 60,3%
6 Jógvan Ranghamar Atli Hansen Eysturoy
839 59,8%
7 Páll S. Sørensen Jógvan Clementsen Klaksvík
835 59,5%
8 Símin Lassaberg Dia JacobsenEysturoy 827 58,9%
9 Heðin Mouritsen Jóannes MouritsenTórshavn
816 58,1%
10 Hanneba Andreas Suðuroy 781 55,6%

Liðið hjá Allan Dal-Christiansen steypavinnari

Leygardagin 12. februar skipaði Føroya Bridge Samband fyri árligu Steypakappingini í bridge. 8 lið høvdu boða frá luttøku. Kappingin varð leikt í Bridgehúsinum í Havn.

Kappingin, ið varð skipað sum ein miniliðkapping, har øll spældu ein dyst á 8 spøl, móti hvørjum, gjørdist ikki so spennandi, sum fleiri høvdu vænta. Tað gjørdist skjótt greitt, at liðið hjá Allani Dal-Christiansen hevði ein góðan dag og at teir neyvan fóru at verða tiknir.

**Støðan**

| | | |
|---|---|---|
| Allan Dal-Christiansen | 276 | 1 |
| Jóannes Mouritsen | 244 | 2 |
| Dia Jacobsen | 228 | 3 |
| Bogi Simonsen | 224 | 4 |
| Mortan Rasmussen | 221 | 5 |
| Jóna Grunnveit | 209 | 6 |
| Jógvan Ranghamar | 198 | 7 |
| Danny Danielsen | 192 | 8 |